## 5-stjørnaður pallborðsfundur:
## Hvat kann gerast fyri at fáa betri lag á føroyska arbeiðsmarknaðinum?

- viðvíkjandi ósemjum partanna millum í sáttmálaskeiðnum og undir samráðingum, og
- viðvíkjandi áliti og samskifti millum partarnar og við politisku myndugleikarnar fyri at menna ein framrættaðan arbeiðsmarknaðarpolitikk.

**mánadagin 29. sept. 2003, kl. 19.30 í Útvarpshøllini**

**Partarnir ✻ Frøðingar ✻ Politikarar ✻ Fundarstjóri ✻ Fundarfólkið**

Fundurin verður við 3 pallborðum, sum fara at seta spurningar og svara spurningum, áðrenn niðurstøður verða gjørdar. Endamálið er at fáa tey ymsu sjónarmiðini fram í stuttum og greiðum grundgevingum. Onki uttanumtos. Ongar langar og keðiligar røður.

**Pallborð 1: Partarnir**
- Ingeborg Vinther, Føroya Arbeiðarafelag
- Gunnleivur Dalsgarð, Starvsmannafelagið
- Bjørgfríð Ludvig, Vinnuhúsið
- Thomas Magnussen, Fíggjarmálaráðið

**Pallborð 2: Frøðingar**
- Eyðfinnur Jacobsen, løgfrøðingur
- Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur

**Pallborð 3: Politikkarar**
- Bjarni Djurholm, lstm, Fólkaflokkurin
- Hans Pauli Strøm, Javnaðarflokkurin
- Kaj Leo Johannesen, Sambandsflokkurin
- Heini O. Heinesen, Tjóðveldisflokkurin

**Fundarstjóri:**
Helgi Jacobsen, útvarpsmaður.

Evnið er aktuelt og týdningarmikið, so vónandi verður áhugin stórur. Øll eru vælkomin.

**Javnaðarflokkurin**


# Thule-fólk í peninganeyð

**Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, heitir á Lene Espersen um at stuðla thulebúgvum í rættarmálinum ímóti donsku stjórnini. Málið er í vanda fyri at detta niðurfyri, tí thulefólkið ikki hevur ráð at gjalda sínum advokati**

THULEMÁLIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Rættarmálið um at lata Thuleøkið aftur til fólkið er nú hótt. Vantandi fíggjarlig orka til sakføraran hjá thulefólkum kann hava við sær, at alt málið dettur niðurfyri.

Norðuratlantsbólkurin hevur við ótta fylgt hesi gongd, og tað hevur fingið Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmann, sum í løtuni er formaður í bólkinum, at senda eina áheitan til Lene Espersen, løgmálaráðharra.

– Norðuratlantsbólkurin heldur málið hava so grundleggjandi og fólkarættarligan týdning, at tað hevði verið eitt mistak, um málið ikki verður roynt við hægstarætt. Serliga, um hetta kemst av ólíkari orku, sum staturin setir av til sína egnu verju í mun til løgfrøðiligu ráðgevingina hjá thulefólkinum, skrivar Tórbjørn Jacobsen.

Norðuratlantsbólkurin heitir tí inniliga á Lene Espersen um at bera so í bandi, at málið kann vera ført í Hægstarætti soleiðis, at báðum pørtum verður tryggjað eins góðar møguleikar at fáa upplýsingar til vega. Tískil verður biðið um, at løgmálaráðið gevur thulefólkinum fíggjarligan stuðul, sum svarar til ta orku, sum verjin hjá kamaradvokatinum hevur at ráða yvir.

Sosialurin 341800

†

8. september andaðist

**Alfred Nielsen**

ættaður úr Sandavági, búsitandi í Svendborg, 86 ára gamal

*Fam. vegna*
**Andrias Nielsen**

## Tøkk

Eina hjartans takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verfaðir, abbi, bróðir og svágur

**Niklas F. Mikkelsen**

doyði og fór til gravar.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum vóru um hann ta seinastu tíðina.
Takk til prestar, talarar, kirkjutænarar, gravarar, sangarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, gávur og peningagávur til Gøtu kirkju.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Familjunnar vegna**
*Marjun, Eghild, Jórun og Sunrit*





Bileftirlit Føroya
Faroes' Vehicle Inspection

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
FO-110 Tórshavn
tel 350400
fax: 350401
e-mail: bef@bef.fo

SKRÁSETT PRUTL

**1. oktobur, seinasta freist at skráseta prutlið!**

KOYRIÐ LÓGLIGA VIÐ GRØNUM




# Skemtiligur hornblástur hugtekur

**Í løtuni eru tveir hornblásarar á ferð og vitja teir skúlar kring landið. Andras Olsen og Anders Nyquist fara eina skemtiliga ferð í tónleikasøguna og hugtaka næmingar og lærarar við álvara, blandaðum við einum farra av skemti og framúr góðum spæli**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Andras Olsen kenna tónleikahugaðir føroyingar sum framúr hornblásara. Han hevur fingið føroyska heiðursgávu og hevur lisið í London og er partur av hornbólki, ið ferðast í mesta partinum av okkara grannalondum. Hann er sonur Kára Olsen, kendur innan horntónleik og útvarpsarbeiði.

At hann eisini hevur sjónleikaevni, evni innan skemt og frálæru, er kanska ikki øllum kunnugt.

Á skúla í London hitti Andras millum onnir svian Anders Nyquist. Teir baðir spæla nógv saman og í løtuni ferðast teir kring oyggjarnar og vitja skúlar. Teir hava vitjað skúlar í miðstaðarøkinum og í løtuni ferðast teir millum skúlarnar í Suðuroynni.

Mikudagin hildu teir báðir konsert í skúlanum í Vági. Ella rættari er kanska at kalla hetta eina skemtliga frálæru framførslu.

Við hornblástri og skemti verða næmingar og lærarar tiknir við á eina skjóta rundferð í tónleikasøguni. Alt frá Bach og Mozart til jazz og blues og til nýggjasta rapptónleikin. Alt framført á horn, sjálvsagt.

Snillingar eru teir á ljóðførini og við rópum, keipum og frágreiðingum gerst umleið tímalanga framførslan alt annað enn keðilig.

Samband er alla tíðina millum leikararnar báðar og áhoyrararnar. Hvørt tað so er klassiskt, blues, rapp ella tveir cowboyarar, ið standa á gøtuni í einum tvíbardaga, tí rúm er ikki fyri báðum í býnum.

Andras og Anders ferðast hesar dagarnar í Suðuroynni, men óivað eru eisini onnur øki í landum, ið kunnu njóta gott av slíkari vitjan.

Næmingar í Suðuoyni fáa í hesum døgum tilboð um fjøltáttaða frálæru í hornblástri og óivað er slík framførsla áhugavekjandi og við til at kveikja lív í áhugan fyri hornblástri, ið als ikki nýtist at vera keðiligur, um nakar annars heldur tað. Andras og Anders hava í hvussu er prógvað, at hornblástur er hugtakandi og ikki uttan humor.



*Anders Nyquist og Andras Olsen hugtaka í hesum døgum føroyskar skúlanæmingar við hornblástri, blandaðum við søgu og skemti*



*Næmingar og lærarar hugna sær óført, meðan hornsnillingarnir spæla bæði býtt, men eisini sera væl á pallinum*


NÝTT

**Netbóking**

**Nú kanst tú keypa tína ferð á atlantic.fo**

Nú er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways. Vit hava nevniliga fingið netbóking á heimasíðuni. Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil. Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

Gjaldkort, sum kunnu nýtast:
Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355



**Føroya Bjór Cup**

**Firma-kapping**

**Leygardagin, 18/10-03**

3 luttakarar pr. lið
í mesta lagi 2 lið pr. virki

Tilmelding á tlf: 312121
Tilmeldingarfreist 14/10-03

Kostnaður 300,- pr. lið

Avmarkað tilmelding

**BOWLINGHØLLIN Á HÁLSI**
Tel. 31 21 21